# VESTMANNA KOMMUNA

## FÍGGJARÆTLAN

## FYRI

## 2017

Vestmanna Kommuna · Bakkavegur 8 · Postsmoga 91 · 355 Vestmanna
Tlf. 770 100 · Fax 770 101 · vestmanna@vestmanna.fo · www.vestmanna.fo

## Góðu Vestmanna-borgarar

Eins og undarfarin ár verður fíggjarætlanin hjá Vestmanna Kommunu fyri 2017 send hvørjum húski í bygdini. Vit vóna, at fíggjarætlanin gevur tykkum eitt gott innlit í raksturin og løgurnar hjá Vestmanna Kommunu.

**Rakstur og íløgur hjá Vestmanna Kommunu fyri árini 2016 og 2017**

| Samtykt fíggjarætlan 2016 | | Samtykt fíggjarætlan 2017 |
|---|---|---|
| Kr. 53.952.455 | | Kr. 56.191.000 |

| Samtykt arbeiðir at seta í verk í 2017 | | |
|---|---|---|
| **Heilsumiðstøðin**<br>Kantina o.a | | Kr. 1.000.000 |
| **Dagstovnaøkið**<br>Gjaldast skal einans fyri eitt barn | | Kr. 550.000 |
| **Sýslumanshúsini**<br>Skifta tak | | Kr. 300.000 |
| **Skúlin**<br>Umvælingar og viðlíkahald<br>Teldur | | Kr. 344.000<br>Kr. 100.000 |
| **Tiltøk innan mentan**<br>Mentunartiltøk o.a.<br>Kreativur verkstaður | | Kr. 300.000<br>Kr. 150.000 |
| **Johnsa Handil og aðrir bygningar**<br>Umvælingar o.a. | | Kr. 200.000 |
| **Fríðkan**<br>Spælipláss<br>Hylurin við John´sa handil<br>Basan av skøru o.a. | | Kr. 500.000<br>Kr. 500.000<br>Kr. 60.000 |
| **Vetrarfriðing**<br>Lønir, tilfar o.a. | | Kr. 300.000 |
| **Kirkjugarðar o.a.**<br>Slætting og hamping av grøvum | | Kr. 50.000 |
| **Teknisk mál**<br>Nýggj útstykking<br>Alternativir bústaðir<br>Gøtur fríðkan og laðing<br>Brúgv um Fossá<br>Asfaltering<br>Ovarivegur/Toftavegur<br>Sópingarbilur<br>Bátabrúgvar<br>Flutningstól | | Kr. 9.000.000<br>Kr. 300.000<br>kr. 200.000<br>Kr. 2.000.000<br>Kr. 1.000.000<br>Kr. 1.500.000<br>Kr. 150.000<br>Kr. 500.000<br>Kr. 200.000 |
| **Samlaðar rakstrarløgur og løgur** | | Kr. 19.204.000 |

**Fíggjargongdin hetta valskeiðið**
Skattaprocentið hjá Vestmanna Kommunu var í byrjanini á hesum valskeiðnum 23,0%, og frá 1. januar 2016 var kommunuskattaprocentið komið niður á 21,5%. Tvs. at Vestmanna Kommuna hevur lækkað kommunuskattaprocentið við 1,5% hetta valskeiðið.

Tá ið sitandi bygdarráð tók við 1. januar 2013 var nettoskuldin hjá Vestmanna Kommunu 48.6 mió. kr. Og hevur tað eydnast okkum at fáa nettoskuldina við árslok 2015 niður á 24,3 mió. kr. Eftir ætlan verður nettoskuldin við ársenda 2016 á leið 20 mió. kr.

**Vetrarfriðing**
Arbeiðið at vetrarfriða bygdina er nærum komið undir land. Væntandi verður arbeiðið liðugt síðst í januar 2017.

**Trivnaður**
Vestmanna Bygdarráð setur trivnaðin høgt og hevur hesa setuna virkað fyri, at trivnaðartiltøk hava verið fyriskipað.
Vestmannadagarnir 2016 vóru hildnir í september mánaða og sjálvt um veðrið ikki var við okkum, vóru øll tiltøkini væl vitjað. Hóast illfýsna veðrið leygardagin vóru áleið 900 til fólk til morgunmatin. Vestmanna Kommuna takkar øllum so hjartaliga fyri góða undirtøku.

**Barnafamiljur**
Vestmanna Kommuna heldur tað vera alneyðugt at fáa okkara ungu familjur at støðast, eisini fíggjarliga. Tískil fer Vestmanna Kommuna frá 1. januar 2017 at lætta um hjá teimum, sum hava fleiri børn á ansingarstovni í Vestmanna Kommunu. Í dag rindar ein familja fult gjald fyri øll síni børn, men frá 1. januar 2017 skulu hesar familjur einans gjalda fyri eitt barn, tað fevnir um vøggustovu, barnagarð, útibarnagarð og frítíðarstovu.

**Spælipláss**
Sum tíðirnar eru, er ógvuliga umráðandi at hava rørslu í huga. Tað hevur alstóran týdning at hava góð spæliøki í bygdini til ymsu aldursbólkarnar. Vestmanna Kommuna er enn ikki komin á mál við spæliplássum, og tí hevur kommunan sett kr. 500.000 av til spælipláss í 2017.

**Kantina**
Tað er ikki nøktandi, at næmingar sita í flokshølinum og eta matpakka.
Bygdarráðið hevur samtykt at innrætta kjallaran undir Heilsumiðstøðini við køki, so at hølið kann nýtast sum kantina hjá skúlanæmingunum.
Hølini kunnu eisini vera tøk til onnur endamál.

**Skapandi verkstaður**
Vestmanna Kommuna hevur alskyns tilboð til fólk í øllum aldri, men vit eru ikki komin á mál enn. Vestmanna Kommuna hevur funnið nøktandi hølir, ið kunnu brúkast til skapandi verkstaðir so sum málninga/teknilist, seyming, lutir úr hornum, filmslist, glaslist, prent og mangt annað. Vestmanna Kommuna ætlar at seta hesa verkætlan í gongd á sumri 2017.

**Útstykking á Grótbrúgv**
Projekteringin av útstykkingini á Grótbrúgv verður liðug fyrst í 2017. Arbeiðið at útstykkja fer væntandi í gongd í apríl 2017 og vera grundstykkini væntandi byggiklár á sumri 2018.

**Gjógvaráverkætlanin**
Arbeiðið við Gjógvaráætlanini heldur fram. Laðingin fram við bátahylinum, sum hevur verið í gongd nú í tvey ár, fer at halda á fram saman við restini av Gjógvaráætlanini.

**Øðrvísi bústaðarmøguleikar**
Ein ætlan fyri, hvussu Vestmanna skal fara ígongd við íbúðarbygging verður skotin í gongd í 2017. Vestmanna kommuna hevur økir til hetta, so sum turkihúsið hjá D.P. Olsen. Kommunan kemur at bjóða út økir, har veitarar kunnu koma við uppskotum um íbúðarætlanir. Skal kommunan vaksa, er alneyðugt, at íbúðarbygging fer í gongd sum skjótast.

**Gøtur, fríðkan og laðing**
Nú vetrarfriðingin er sett í verk, er ein avbjóðing hjá kommununi at fáa skipað fríðkanina av bygdini. Ymsastaðni í bygdini eru ávís øki, har ið laðað hevur verið. Hendan háttin skulu vit halda fast við; ikki bara tí at hetta er vakurt, men hetta er eisini viðlíkahaldsfrítt, og tí bíligari í longdini. Samstundis er umráðandi, at gøtur, nýggjar sum gamlar, verða settar í stand, so at tær eru góðar at farast á.

**Ovara brúgv um Fossá**
Vestmanna Kommuna raðfestir endurgerð av Niðara vegi ovarlaga. Fyri eisini at tryggja tungu ferðsluni eina farleið, áðrenn drúgva vegagerðin fer í gongd, verður nýggja ovara brúgv um Fossá projekterað og byrjað uppá í 2017. Harafturat verður verandi brúgv, sum nú hevur fingið onkran frammaná, umvæld til bleyta ferðslu.

**Liðugtgerð av Toftavegi og Ovaravegi**
Arbeiðið at nýgera hesi vegastrekki er farið ígongd og verður væntandi liðugt á sumri 2017.

**Bátabrúgvar verða skiftar út**
Bátabrúgvarnar verða endurnýggjaðar, og teir fyrstu 60 metrarnir verða lidnir á sumri 2017.

**Vinnan**
Verandi vinna í Vestmanna skapar góða inntøku fyri bygd og fólk. Bygdarráðið er samt um, at vit kunnu fáa væl meira av vinnu til Vestmanna. Orka verður sett av til at hyggja eftir møguleikum, har nýggj vinna kann fáast í lag.

**Ferðavinna**
Flestu ferðafólk, sum koma til Føroya, vitja Vestmanna. Vit eiga at troyta allar møguleikar innan ferðavinnuna, ið kundi fevnt um bjørgini, fjøllini, vágna og bygdina sjálva.
Tað er bara hugflogið, sum setur mark fyri, hvat vit kunnu og ikki. Ferðavinnan er vaksandi í dag, og vit í Vestmanna skulu vera við, so nýggj og meiri fjøltáttaði tilboð eru til tann ferðandi. Vestmanna Kommuna ynskir at vera ein aktivur viðspælari í hesum.

Vestmanna bygdarráð takkar øllum vestmenningum fyri gott samstarv og ídni.

Við ynski um gleðilig jól og gott nýggjár

Pauli T. Petersen
borgarstjóri

# Vestmanna Kommuna

## Fíggjarætlan 2017

| 2016 Salda | 2016 Samanteljing | Heiti | 2017 Salda | 2017 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Samsýningar til kommunustýrislimir** | | |
| 1.063.340 | | Lønir | 1.154.393 | |
| 106.375 | | Rakstrarútreiðslur | 153.125 | |
| | **1.169.715** | | | **1.307.518** |
| | | **Val og valnevndir** | | |
| 21.000 | | Lønir | 21.000 | |
| 19.125 | | Rakstrarútreiðslur | 19.125 | |
| | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **40.125** | | | **40.125** |
| | | **Kommunufyrisitingin** | | |
| 1.516.000 | | Lønir | 1.698.000 | |
| 1.388.938 | | Rakstrarútreiðslur | 1.573.125 | |
| -270.000 | | Rakstrarinntøkur | -270.000 | |
| | **2.634.938** | | | **3.001.125** |
| | | **Skattakærunevndin** | | |
| 71.000 | | Lønir | 71.000 | |
| 36.000 | | Rakstrarútreiðslur | 36.000 | |
| -73.000 | | Rakstrarinntøkur | -73.000 | |
| | **34.000** | | | **34.000** |
| | | **Føroya Kommunfelag** | | |
| 200.000 | | Rakstrarútreiðslur | 230.000 | |
| | **200.000** | | | **230.000** |
| | | **Hvíldarheimið Naina** | | |
| 125.000 | | Rakstrarútreiðslur | 125.000 | |
| | **125.000** | | | **125.000** |
| | | **Kommunulæknaútreiðslur** | | |
| 54.688 | | Lønir | 0 | |
| 285.313 | | Rakstrarútreiðslur | 147.188 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 30.000 | |
| | **340.000** | | | **177.188** |
| | | **Heilsurøkt, skúlin** | | |
| 9.000 | | Rakstrarútreiðslur | 9.000 | |
| | **9.000** | | | **9.000** |
| | | **Læknamiðstøð** | | |
| 81.725 | | Lønir | 125.741 | |
| 355.750 | | Rakstrarútreiðslur | 296.250 | |
| -100.000 | | Rakstrarinntøkur | -100.000 | |
| | **337.475** | | | **321.991** |
| | | **Læknamiðstøð, kjallari** | | |
| 0 | | Rakstrarútreiðslur | 1.062.500 | |
| | **0** | | | **1.062.500** |
| | | **Tannrøkt** | | |
| 879.000 | | Lønir | 916.204 | |
| 160.000 | | Rakstrarútreiðslur | 145.000 | |
| -315.000 | | Rakstrarinntøkur | -315.000 | |
| | **724.000** | | | **746.204** |

| 2016 Salda | 2016 Samanteljing | | 2017 Salda | 2017 Samanteljing |
| --- | --- | --- | --- | --- |
| | | **Barnaverndartænastan** | | |
| 1.410.000 | | Rakstrarútreiðslur | 1.410.000 | |
| | **1.410.000** | | | **1.410.000** |
| | | **Heimið á Grønanesi** | | |
| 0 | | Lønir | 0 | |
| 318.750 | | Rakstrarútreiðslur | 53.125 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **318.750** | | | **53.125** |
| | | **Tilboð og tiltøk til eldri** | | |
| 0 | | Lønir | 0 | |
| 92.000 | | Rakstrarútreiðslur | 92.000 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **92.000** | | | **92.000** |
| | | **Heimatænastan VEKS** | | |
| 13.158.575 | | Flyting til eldrasamstarv | 12.531.000 | |
| -1.681.000 | | Leigugjald fyri "Heimið á Grønanesi" | -1.681.000 | |
| | **11.477.575** | | | **10.850.000** |
| | | **Fíggjarlig frípláss** | | |
| 325.000 | | Rakstrarútreiðslur | 246.000 | |
| | **325.000** | | | **246.000** |
| | | **Staðið - ungdómshús** | | |
| 495.062 | | Lønir | 501.102 | |
| 224.125 | | Rakstrarútreiðslur | 224.125 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **719.187** | | | **725.227** |
| | | **Dagstovnaøkið, Gjáarlon og Látipípan** | | |
| 8.600.543 | | Lønir | 8.737.741 | |
| 753.188 | | Rakstrarútreiðslur | 881.813 | |
| -2.161.000 | | Rakstrarinntøkur | -1.500.000 | |
| | **7.192.730** | | | **8.119.554** |
| 455.000 | | **Stuðlar børn í dagstovni** | | |
| | **455.000** | Lønir | 455.000 | |
| | | | | **455.000** |
| | | **Fólkaskúlin** | | |
| 85.000 | | Lønir | 85.448 | |
| 957.813 | | Rakstrarútreiðslur | 935.500 | |
| | **1.042.813** | | | **1.020.948** |
| | | **Fólkaskúlin bygningar o.a.** | | |
| 2.107.033 | | Lønir | 2.178.468 | |
| 1.675.500 | | Rakstrarútreiðslur | 567.313 | |
| -425.000 | | Rakstrarinntøkur | -425.000 | |
| | **3.357.533** | | | **2.320.780** |
| | | **Serundirvísing, fólkaskúlin** | | |
| 38.000 | | Rakstrarútreiðslur | 38.000 | |
| | **38.000** | | | **38.000** |
| | | **Lærlingaútreiðslur, vinnuskúlar** | | |
| 120.000 | | Rakstrarútreiðslur | 120.000 | |
| | **120.000** | | | **120.000** |
| | | **Musikkskúlin** | | |
| 153.000 | | Lønir | 153.000 | |
| 327.750 | | Rakstrarútreiðslur | 372.750 | |
| -46.000 | | Rakstrarinntøkur | -46.000 | |
| | **434.750** | | | **479.750** |

| 2016 Salda | 2016 Samanteljing | | 2017 Salda | 2017 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Kvøldskúlin** | | |
| 191.000 | | Lønir | 191.000 | |
| 36.563 | | Rakstrarútreiðslur | 25.938 | |
| -130.000 | | Rakstrarinntøkur | -130.000 | |
| | **97.563** | | | **86.938** |
| | | **Mentanarmál** | | |
| 37.000 | | Lønir | 37.000 | |
| 401.875 | | Rakstrarútreiðslur | 667.500 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **438.875** | | | **704.500** |
| | | **Skúla- og bygdarbókasavn** | | |
| 59.000 | | Lønir | 59.000 | |
| 122.000 | | Rakstrarútreiðslur | 122.000 | |
| -55.000 | | Rakstrarinntøkur | -55.000 | |
| | **126.000** | | | **126.000** |
| | | **Vestmanna bygdarsavn** | | |
| 15.000 | | Lønir | 15.000 | |
| 261.063 | | Rakstrarútreiðslur | 295.063 | |
| -26.000 | | Rakstrarinntøkur | -26.000 | |
| | **250.063** | | | **284.063** |
| | | **Ítróttarhøll** | | |
| 790.000 | | Rakstrarútreiðslur | 790.000 | |
| | **790.000** | | | **790.000** |
| | | **Fríðkan av kommununi** | | |
| 489.126 | | Lønir | 491.557 | |
| 814.125 | | Rakstrarútreiðslur | 1.194.625 | |
| -5.000 | | Rakstrarinntøkur | -5.000 | |
| | **1.298.251** | | | **1.681.182** |
| | | **Hegn og bøgarðar** | | |
| 718.000 | | Lønir | 99.095 | |
| 767.125 | | Rakstrarútreiðslur | 206.250 | |
| 1.500.000 | **2.985.125** | | | **305.345** |
| | | **Byggibúning** | | |
| 150.000 | | Rakstrarútreiðslur | 0 | |
| -600.000 | | Rakstrarinntøkur | 6.300.000 | |
| | **-450.000** | | | **6.300.000** |
| | | **Kirkjugarðarnir og minnisvarðin** | | |
| 59.000 | | Lønir | 59.000 | |
| 225.250 | | Rakstrarútreiðslur | 124.313 | |
| | **284.250** | | | **183.313** |
| | | **Líkvognur** | | |
| 59.000 | | Lønir | 60.000 | |
| 26.000 | | Rakstrarútreiðslur | 26.250 | |
| -63.000 | | Rakstrarinntøkur | -48.000 | |
| | **22.000** | | | **38.250** |
| | | **Vatnveiting** | | |
| 359.000 | | Lønir | 377.223 | |
| 219.188 | | Rakstrarútreiðslur | 219.188 | |
| -4.000 | | Rakstrarinntøkur | -4.000 | |
| | **574.188** | | | **592.411** |

| 2016 Salda | 2016 Samanteljing | | 2017 Salda | 2017 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Kloakkir** | | |
| 302.000 | | Lønir | 320.068 | |
| 437.250 | | Rakstrarútreiðslur | 437.250 | |
| -18.000 | | Rakstrarinntøkur | -18.000 | |
| | **721.250** | | | **739.318** |
| | | **Vegir** | | |
| 307.000 | | Lønir | 320.068 | |
| 11.217.688 | | Rakstrarútreiðslur | 5.549.875 | |
| 0 | | Rakstrarinntøkur | 0 | |
| | **11.524.688** | | | **5.869.943** |
| | | **Gøtusóping o.a.** | | |
| 302.000 | | Lønir | 320.068 | |
| 85.000 | | Rakstrarútreiðslur | 159.375 | |
| | **387.000** | | | **479.443** |
| | | **Gøtuljós** | | |
| 0 | | Lønir | 0 | |
| 570.563 | | Rakstrarútreiðslur | 464.313 | |
| | **570.563** | | | **464.313** |
| | | **Maskinhøllin** | | |
| 680.000 | | Lønir | 997.420 | |
| 563.375 | | Rakstrarútreiðslur | 722.063 | |
| -5.000 | | Rakstrarinntøkur | -5.000 | |
| | **1.238.375** | | | **1.714.482** |
| | | **Renovasjón** | | |
| 148.000 | | Lønir | 160.034 | |
| 1.926.313 | | Rakstrarútreiðslur | 1.926.313 | |
| -20.000 | | Rakstrarinntøkur | -15.000 | |
| | **2.054.313** | | | **2.071.347** |
| | | **Grind** | | |
| 0 | | Lønir | 0 | |
| 18.688 | | Rakstrarútreiðslur | 18.688 | |
| | **18.688** | | | **18.688** |
| | | **Sløkki- og bjargingarliðið** | | |
| 293.000 | | Lønir | 293.000 | |
| 623.438 | | Rakstrarútreiðslur | 417.188 | |
| | **916.438** | | | **710.188** |
| | | **Vestmannahavnar Havn** | | |
| 532.272 | | Lønir | 554.792 | |
| 1.746.000 | | Rakstrarútreiðslur | 1.120.000 | |
| -1.000.000 | | Rakstrarinntøkur | -1.000.000 | |
| | **1.278.272** | | | **674.792** |
| | **57.723.488** | **Rakstur og íløgur - samantalt** | | **56.819.546** |

| 2016 Salda | 2016 Samanteljing | | 2017 Salda | 2017 Samanteljing |
|---|---|---|---|---|
| | | **Rakstur og íløgur - samantalt** | | |
| 1.000.000 | **1.000.000** | **Rentustuðul, stuðul til rentuútreiðslur** | 1.000.000 | **1.000.000** |
| 600.000 | **600.000** | **Rentugjaldingar, rentuútreiðslur** | 600.000 | **600.000** |
| 0 | **0** | **Rentugjaldingar, rentuinntøkur** | 0 | **0** |
| -41.045.455 | **-41.045.455** | **Kommunuskattur 21,5%** | -43.260.000 | **-43.260.000** |
| -2.000.000 | **-2.000.000** | **Felagsskattur** | -2.000.000 | **-2.000.000** |
| 0 | **0** | **Avgjald av kapitaleftirlønum** | 0 | **0** |
| -9.211.000 | **-9.211.000** | **Skattur av eftirlønargjøldum** | -9.394.000 | **-9.394.000** |
| -2.885.000 | **-2.885.000** | **Flyting vegna DIS, FAS og frádráttir** | -3.137.000 | **-3.137.000** |
| -411.000 | **-411.000** | **Tíðaravmarkað flyting vegna eldraøkið** | 0 | **0** |
| | **-53.952.455** | **Skattur o.a. - samantalt** | | **-56.191.000** |
| 0 | **0** | **Afturgjald av skuld** | 0 | **0** |
| **Vinning/hall** | **3.771.033** | **Hall** | | **628.546** |

Samtykt á bygdarráðsfundi 24.11.2016

Pauli T. Petersen
borgarstjóri